Telefonbókin 2001

Í mars 2001 verður telefonbókin fyri ár 2001 borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum.

Virki og stovnar skulu boða frá um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt í næstu útgávu.

Seinasta freist at lata broytingar inn er ***týsdagin 31. oktober 2000***

Hvítu síður

Týsdagin 31. oktober 2000 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2001 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 548 í telefonbókini 2000, ið skal sendast til: Teknisk avgreiðsla, Føroya Tele, Postboks 27, FO-100 Tórshavn ella faks 31 79 68.

Eykaupptøkur v.m.:
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 57,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

Búmerkið:
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 1.500,00 kr (ikki íroknað mvg).
Talið av búmerkjum í Hvítu síðum er avmarkað.

Gulu síður

Týsdagin 31. oktober 2000 er seinasta freist, at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum. Skrásetingar-/rættingarblað til Gulu síður er á síðu 547 í telefonbókini 2000, ið skal sendast til Teleforlagið.

Prísir:

(A)+(D)	Standardlýsing	kr.	650,00
(B)	Stórt navn	kr.	50,00
(C)	Innramming	kr.	100,00
(E)	Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm)	kr.	20,00

Litlýsingar:
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.

GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!

FØROYA TELE
att: Teleforlagið
Postboks 27 · 110 Tórshavn · tel 30 30 30 · fax 30 30 31
www.nummar.fo · info@nummar.fo

Keyp myndir

Nú er møguleiki at keypa myndir sum standa í Sosialinum

Kostnaður pr. stk. fyri litmynd:

10x15 cm. kr. 80,-	18x24 cm. kr. 150,-
13x18 cm. kr. 100,-	20x30 cm. kr. 200,-
15x21 cm. kr. 130,-	30x45 cm. kr. 350,-

Fyll henda lepan út.
Klipp myndina út og send hana saman við lepanum til Sosialin.

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Blað nr.: ______
Síða: ______
Stødd: ______
Mongd: ______

Navn: ______
Bústaður: ______
______
Telefon: ______

SCANIA H 6x2Z TANGABILUR

Árgangur 1991 (27.05.91).
Koyrt knapt 700.000 km. – 340 HK motorur.
Tangin 12–13.000 ltr. – úr rustfríum stáli/isoleraður.
Bilurin hevur verið væl røktur og er í góðum standi.
Prísuppskot kr. 200.000,00

Sosialurin - 311820

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
Hoyvíksvegur 63 • Postboks 3205 • 110 Tórshavn
Tel. 313666 • Fax 310866 • E-mail: ivanjoh@olivant.fo
www.ivan.fo

Seminar og møtir við Jens Garnfeldt:

Hvat sigur Bíblian um
PENGAR

Eiga vit at lata tíggjund? · Hvat er offur?

Komið og hoyrið um hetta evnið í

LÆRARASKÚLAHØLLINI
27.-29. oktober

Seminar:
Fríggjakvøldið kl. 20
Leygardagin kl. 10 og 14

Møtir:
Leygarkvøldið kl. 20
Sunnudagin kl. 11 og 18

Øll eru hjartaliga vælkomin

Berið alla tíggjundina inn í goymsluna, so matur kann vera í húsi Mínum – roynið Meg á henda hátt – sigur Harrin Gud … Mal. 3, 10

Betania · Keldan · Lívsins Orð
Evangeliihúsið · Rhema · Filadelfia

ítróttur

Nr. 206 • hósdagur • 26. oktober 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Flemming hevur einki hoyrt



Hóast ensku bløþini í heilum nevna FCK venjaran, Roy Hodgson, sum møguligt evni til landsli›svenjarasessin, so hevur FCK ikki hoyrt naka› sum helst um hetta.

Stjórin í felagnum, Flemming Østergaard, sigur vi›i Ritzau, at teir als einki hava hoyrt frá enska fótbóltssambandinum.

– Vit kunnu ikki taka stø›u til slatur og leysatí›indi, sum bert hava til endamáls at selja blø›ini, sigur Østergaard.

Enska fótbóltssamband› sigur seg ein lista vi› trimum møguligum evnum, sum teir í nærmastu framtí› fara at tosa nærri vi›.

Í ensku mi›lunum ver›ur gitt, at hesir tríggir eru Roy Hodgson hjá FCK, Svenski Sven-Göran Eriksson úr Lazio og fraklendingurin hjá Arsenal, Arséne Wenger

Ensku mi›larnir vilja eisini vera vi›, at Hodgson er favoritturin av hesum trimum, tí hann fram um hinar er enskur borgari. Naka› sum í stóran mun talar til fyrimuns hjá ærukæru bretunum.

jm

VB vann greipuna

Føroyameistararnir úr Vági vunnu eisini sína egnu innandurakapping, og kvinnurnar stó›u einki aftanfyri

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Ta› stó› VB á øllum, tá óalmenna FM í innandurafótbólti var á skránni um vikuskifti›.

Hjá monnunum var VB sjálvandi millum favorittarnar, nú teir endiliga høvdu vunni› FM, og favorittleiklutin livdu teir eisini upp til vi› maner.

VB gjørdist nevnliga bæ›i framt og næstfremst hjá monnum, so hóast ta› ikki eydna›ist at vinna kappingina um Løgmanssteypi› í ár, so var› talan kortini um eina greipu til vágbingar.

Eisini hjá kvinnunum gekst væl hjá heimali›num, tó at tær ikki vóru somiki› suverenar í hesum. Nøgdar munnu tær kortini vera, um at ta› eydna›ist teimum at vinna bæ›i gull- og bronsukrónur.

Í kappingini vór›u eisini latin steyp til mest skorandi li›i› og til mest skorandi leikararnar, og eisini her var ta› VB, sum gjørdi um seg.

Mest skorandi leikararnir vóru úr VB, og gjørdust Mikal í Lágabo og Guri› Mortensen vinnarar av hesum steypum vi› 10 málum hvør. Mest skorandi li›ini vóru eisini VB hjá bá›um kynum.

Vinnarar av kvinnudeildini gjørdust VB. Vi› á li›num vóru Linda Kjærbo, Guri› Mortensen, Halltóra Joensen, Rannvá Augustinussen og Diana Dahl



VB vann eisini kappingina hjá monnum, og standa teir her vi› bá›um FM-steypunum. Á li›num vóru Bjarni Johansen, Tór›ur Holm, Jón Gærdbo, Palli Augustinussen og Petur Óli Samuelsen

Leikarar velja

Fastur táttur á innandurakappingini er eisini avdúkingin av ársins leikarum.

Hesi ver›a kosin av mótleikarum, og eru ta› allir leikarar í fremstu deildunum, sum sleppa at atkvø›a. Einasta treytin er, at atkvø›an ikki fer til ein li›felaga.

Undir bor›haldinum leygarkvøldi› vór›u nøvnini so avdúka›. Ársins leikari hjá monnum gjørdist leikandi VB-venjarin, Krzystof Popczynski, me›an Rannvá Andreassen úr KÍ gjørdist ársins leikari hjá kvinnum. Á málverjaplássunum gjørdust vinnararnir Tróndur Vatnhamar úr B36 og Annika Hansen úr HB.

Bæ›i kappingin og kjósanin av ársins leikarum, er annars naka›, sum flestu leikarar í landinum vi› spenningi síggja fram til. Umframt at ta› ver›ur kappast, er eisini sosiala samveran millum leikararnar í hásætinum, og ivaleyst er hetta eisini tiltrongt, eftir at hert kappingarár, har onkur illsinnisgleps ivaleyst eru fokin ígjøgnum luftina.

Og at kappingin er komin fyri at vera, men neyvan nakar ivi vera um. Fyrstu fer› hon var› skipa› var í 1991, og var hetta sostatt 10. fer›in á ra›, at vágbingar runda›u fótbóltsári› av.

B36 styrkir seg

Komandi ár spæla bæ›i Arnbjørn Danielsen og He›in á Lakjuni vi› B36. Hesum hevur forma›ur felagsins, Kristian á Neystabø nú bo›a› frá.

Ta› hevur annars leingi veri› at hoyrt, at hesir bá›ir skuldu fara til Havnar, men ikki fyrr enn nú, er alt endaliga komi› upp á pláss hesum vi›víkjandi.

Kristian á Neystabø sigur, at teir rokna vi› at fáa stóra gle›i av leikarunum, og ivast heldur ikki í, at B36 vi› hesum fer styrkt undir fyrireikingarnar til komandi kappingarár.

Arnbjørn Danielsen hevur á›ur spælt vi› B36, og var í 1997 vi› til at vinna fyrsta FM-heiti felagsins í 35 ár. Í fjør var hann aftur at síggja í B68, men nú er so sta›fest, at ste›gurin har ikki gjørdist drúgvur.

He›in á Lakjuni telist helst millum mest evnaríku leikarar í landinum, og í B36 ivast tey ikki í, at hetta er gó›ur fongur hjá felagnum. Orsøkin til skifti›, er fyrst og fremst, at He›in nú flytir til Havnar.

Venjaraspurningurin hjá B36 er nú eisini avgreiddur, og ver›ur ta› Piotr Krakowski, sum skal taka sær av hesum. Í fjør byrja›i Piotr sum hjálparvenjari, men eftir at sviin, Pelle Anderson, samdist vi› felagi› um at gevast, stó› póllendingurin vi› st‡risvølin seinastu dystirnar á árinum.

jm